# Góðir TB-dagar



*Serliga TB hevði nógv at fegnast um í kappingini. Genturnar vunnu at kalla alt, og í yngsta gentubólkinum gjørdist tað til bæði gull og bronsu, meðan Dráttur tók sær av silvurinum*

**Tey bæði seinastu vikuskiftini hevur Dráttur skipað fyri seinastu steypakappingini á árinum fyri yngru liðini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum vant, so var seinasta steypakappingin í flogbólti hjá yngru liðunum við kappingini hjá Drátti, sum hesaferð varð hildin yvir tvey vikuskifti.

Seinna av hesum kappingum varð seinasta vikuskiftið, og mundu ikki minst tey av Tvøroyri fara væl nøgd heimaftur. TB hevur seinnu árini átt eitt av allar sterkastu kvinnuliðunum í landinum, og skal metast eftir yngru deildunum, so stendur hetta ikki at broyta. TB vann nevnliga kappingina hjá teimum trimum yngstu gentubólkunum. Og kanska fara mannfólkini á Tvøroyri eisini at gera um seg í bestu deildini innan alt ov nógv ár. Her kom nenvliga eisini eitt gullmerki til høldar, umframt at yngstu dreingirnir vunnu silvur.

Enn er ein kapping eftir hjá yngru liðunu eftir. Tað er FM-kappingin, sum verður í Havn í døgunum, 3. og 4. apríl.

**Úrslit úr Dráttur-kappingini**

**Dreingir 10**
1 ÍF
2 TB
3 SÍ

**Dreingir 12**
1 TB
2 Fleyr
3 ÍF

**Dreingir 14**
1 SÍ
2 Fleyr
3 Mjølnir

**Mansunglingar**
1 SÍ
2 Fleyr
3 Mjølnir

**Gentur 10**
1 TBa
2 KÍF
3 TBc

**Gentur 12**
1 TB
2 KÍF
3 Mjølnir

**Gentur 14**
1 TB
2 SÍ
3 Mjølnir

**Kvinnuunglingar**
1 SÍ
2 KÍF
3 Dráttur

## Føðingardagur

**Hóast venjaraskiftið ikki mundi vera best hugsandi føðingardagsgávan, so eru tey í Kyndli sum heild væl nøgd við kappingarárið**

Tað var á sjálvum føðingardegnum hjá Kyndli, at nevndin mátti ásanna, at samstarvið við Jan Djurhuus ikki riggaði nóg væl.

Kyndil varð stovnað tann 10. mars í 1956, og hevur felagið soleiðis bert knappliga tvey ár eftir til stóra 50 ára føðignardagin.

Tó at felagið nú skiftir venjara, og tó at tað hevur gingist nakað serligt hjá besta kvinnuliðnum, so sigur nevndin seg vera væl nøgda við avrikini hja felagnum í ár.

Ikki minst er hetta grundað á dreingjadeildirnar, har felagið longur hevur ognað sær meistaraheitið í dreingjum 10, dreingjum 12, dreingjum 14 og í mansunglingadeildini, og hartil hevur felagið eisini góðan møguleika at taka gullið í kappingini fyri dreingir 16.

Og sum ein krúlla kann so eisini skoytast uppí, at gomlu kempurnar sum manna triðju deild, eisini hava tryggjað sær meistaraheitið. Her var ætlanin nokk, at teir skuldu fara ósigraðir ígjøgnum kappingina, men í seinasta dystinum á árinum máttu teir lúta fyri teimum gomlu hjá Neistanum, men samlaði oddasessurin stóð ikki at vika av teirri orsøk.

**-jm**

## Frælsi til frælsan ítrótt

Mikudagin varð nýtt ítróttarfelag sett á stovn í Vágum.

Talan er um felag fyri frælsan ítrótt, og er navngevingin eisini knýtt at hesum.

Nýggja felagið kemur nevnliga at eita Frælsi, og í fyrstu nevndina eru komin Sólfríð Fjallsbak, sum er formaður, Hans Petur Weihe og Sølvi Ragnarsson.

Fyrst og fremst er endamálið hjá felagnum at fáa gongd á virksemið innan frælsu ítróttina í oynni, og sagt verður, at fyrstu venjingarnar ætlandi byrja eftir páskafrítíðina.

**-jm**

## Viasat Sport 2

Tey, sum síggja Televarpið, løgdu kanska til merkis, at tað týs- og mikukvøldið bar til at síggja Champions League fótbólt á fleiri rásum.

Televarpið hevur nevnliga gjørt avtalu við Viasat, soleiðis at rásin, sum vanliga verður nýtt til Viasat Nature/Action ístaðin verður nýtt til Sport2, tá hetta verður mett neyðugt.

Og her er tað í løtuni serliga Champions League dystirnir, sum hava áhuga.

Enn er talan tó bert um fyribils avtalu við Viasat, men einki er at ivast í, at føroyskir fótbóltsfjepparar vóna, at talan verður um eina varandi avtalu.

**-jm**

**Gerst studentur á Miðnámsskúlanum í Suðuroy**

Leggið til merkis! Møguleiki er eisini at taka einkultar lærugreinir.

Umsóknarbløð fáast frá fólkaskúlunum og Miðnámsskúlanum.

Hevur tú brúk fyri nærri upplýsingum, ring so til lestrarvegleiðaran, tlf. 374011 ella 372082.

Tú kanst eisini royna www.midnam.fo

Umsóknarfreistin er 15. mars.

**Miðnámsskúlin í Suðuroy**
**FO-900 Vágur**
**Skrivstovan tlf. 373622**

**TOYOTA HIACE 2.4 DIESEL**



**Hvítur persónbussur við 11 setrum.**

· Árg. sep 1995
· koyrt 142.000 km.
· Sýnaður í des. 2003
· Fult eftirlit í febr. 2004
· 4 eyka felgur fylgja við
· Ein eigari
· Í sera góðum standi

Til sølu um hóskandi boð fæst ella møguliga í býti við nýggjari Toyota stationcar.

**Tel 31 39 74 ella 21 39 74**

Sosialurin 341800

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3737
**Navn:** Sp/f Bilservice
**Adressa:** Stengarvegur 1, 700 Klaksvík
**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 02.03.2004
**Viðtøkudato:** 02.03.2004
**Kapitalur:** Kr. 90.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 90.000,00 kontant til kurs 100.
**Stovnari:** Theodor Fonn, Skarðsvegur 11, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Theodor Fonn, Skarðsvegur 11, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Búskaparstovan, Finnur Sivertsen, skrás. grannsk., 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 02.03.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita tænastur innan bilverkstað, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 10. februar 2004*

*Kristin Balle*

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

**Aðalfundur**

Maskinmeistarafelagið hevur ársaðalfund á Hotel Hafnia

**leygardagin 13. mars kl. 14.00.**

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

Sosialurin
1
Fyrst við tí seinasta

Kvinnuráðstevna
"Facing the future with Jesus"
við
Anne Graham Lotz
8. mai 2004
Falkonerteatret · Keypmannahavn
les meira á: www.kvinder.com




Úr Vágum:
Fríggjadag 7. mai kl. 17.30

Heimaftur:
Sunnudag 9. mai kl. 8.40

Íroknað kostnaðin er:
· flogferð við ferðaavgjøldum
· gott innivist
· bussur í Keypmannahavn við komu og fráferð
· atgongugjald til ráðstevnuna

Fyri hvønn á dupultkamari
**kr. 3.885,-**

meirkostnaður
fyri einkultkamar kr. 570,-
morgunmatur kr. 35

www.travel.fo

**Faroe Travel**
tel 312600

**Tøkk fyri stuðulin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
SMYRIL LINE
ATLANTIC AIRWAYS
Hertz
NCC
HANDILIN
formula.fo
Virkisráðgeving Ltd.
FAXE KONDI
Sosialurin
visit-faroeislands.com
M3M
Team85
BURGER KING